# Prísirnir á bensini og olju hækka enn meira

*Hóast oljulondini hava samtykt at hækka framleiðsluna, fer hetta ikki at føra til lægri prísir enn á sinni, siga serfrøðingar. Tvørturímóti hækka prísirnir í Føroyum munandi longu aftur í dag*



*Aftur í dag hækka prísirnir á olju og bensini munandi og ongi útlit eru til lækkingar í næstum, hóast OPEC hevur samtykt at økja framleiðsluna*

ÁKI BERTHOLDSEN

Enn eru ongi útlit til at prísirnir á olju og bensini fara at lækka aftur.

Tvørturímóti verður enn ein munandi príshækking sett í gildi í Føroyum longu aftur í dag.

Prísirnir hjá Shell hækka 15 oyru fyri liturin, bæði prísurin á bensini, diesel og á brenniolju.

Hákun Djurhuus, stjóri á Shell sigur, at tað er vónleyst at siga nakað um, hvussu prísgongdin verður í framtiðini.

Men hann heldur ikki, at tað er nakað, sum talar fyri, at hann fer at lækka í næstum og møguliga eru enn fleiri hækkingar á veg.

Eftir hækkingina í morgin fer ein litur av blýfríum bensini at kosta 8,95 krónur hjá Shell, ein litur av kalium bensini fer at kosta 9,08 krónur, ein litur av diesel kemur upp á 5,40 krónur.

Harafturat fer brennioljan til húsarhaldini at kosta 4,47 og eitt hálvt oyra fyri liturin og oljan til skipini fer at kosta 2,97 krónur fyri liturin.

### Ger ongan mun

Annars vóru tað mong, sum høvdu sett sítt álit á, at prísirnir fóru at lækka, nú oljulondini í OPEC skuldu hittast á fundi í eysturríkska høvuðsstaðnum, Wien, sunnudagin, at umrøða oljuprísirnar.

Bæði USA og ES hava lagt hart trýst á OPEC fyri at fáa oljulondini at økja framleiðsluna fyri at tálma teimum høgu prísunum.

Og á oljufundinum sunnudagin varð eisini samtykt at hækka framleiðsluna 800.000 tunnur um dagin, hetta er ein hækking upp á 3%.

Sambært útlendskum fjølmiðlum skuldi hækkingin setast í verk frá 1. oktober.

Men tað skilst á oljuserfrøðingum, at tað eru ongi útlit til, at brúkararnir fara at merkja nakað til hesa framleiðsluøkingina, í hvussu so er ikki fyribils.

Víst verður á, at veturin stendur fyri durum og at oljugoymslurnar eru frammanundan í botni.

Samstundis fer tað at taka eina tíð, áðrenn oljan, sum verður framleitt meir, er reinsað og annars komin ígjøgnum alla skipanina, út á marknaðin.

Og tað eru eru eisini serfrøðingar, sum vilja síggja framleiðsluøkingina í verki, áðrenn teir trúgva nøkrum, og áðrenn teir kunnu siga nakað um útlitini, tí viðhvørt er langt ímillum orð og gerðir hjá OPEC londunum, verður sagt.

– So tað verður neyvan enn á sinni, at brúkararnir fara at merkja nakað til framleiðsluøkingina og at prísirnir fara at lækka.

– Í besta føri kunnu vit rokna við eini lítlari lækking í næstum, siga tey, sum hava skil fyri oljuprísum.

Hetta sást eisini á marknaðinum summastaðni í gjár, tá ið prísurin fall næstan ein dollara fyri tunnuna.

Men hetta lítla prísfallið kom, eftir at prísirnir vóru komnir upp á 35 dollarar fyri tunnuna, sum er met, eftir, hvat sigst. Hetta er tríggjar ferðir so nógv, sum tunnan kostaði fyri einum ári síðani.

Øllum hesum metingum er Hákun Djurhuus, ikki ósamdur í.

Men hann sigur, at prísurin á olju er m.a. ein spurningur um, hvussu stórur partur av honum byggir á verulig kostnaðarlig viðurskifti, og, hvussu stórur partur er ein avleiðing av, at fjáltur er á marknaðinum.

– Tað kann vera, at OPEC fundurin sunnudagin hevur tikið tað ringasta trýstið av marknaðinum, so at prísirnir kanska linka eitt lítið sindur, sigur Hákun Djurhuus.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa eina viðmerking frá Statoil, men tað plagdi so vera, at tá ið eitt oljufelag hækkar prísirnar, hækka prísirnar hjá Satoil eisini.

# Nýggjur Goðafoss

*Eimskip økir orkuna á Føroyarutuni mundandi. Nýtt skip var á Havnini í gjár, og systurskipið kemur um stutta tíð*



*Ingilbert Ingilbertsson er skipari á Goðafoss*
*Mynd: Jens K. Vang*

EDVARD JOENSEN

**Tórshavn :**
Nýggi Goðafoss er rættiliga væl størri enn skipini, sum frammanundan hava røkt farmaleiðina millum Ísland og europeiska meginlandið um Føroyar.

Goðafoss fer saman við systurskipinum, Dettifoss, at røkja rutuna millum Ísland, Føroyar og meginlandið. Goðafoss er fyrra skipið, sum kemur í hesa betraðu rutuna. Dettifoss kemur um stutta tíð.

Rutan er gomul og hevur verið røkt av fleiri skipum. Men nú hesi bæði stóru skipini fara at sigla, verða tey einsamøll, segði Linda Gunnlaugsdóttir, stjóri á Eimskip Føroyum, á samkomu umborð á Goðafoss mánadagin.

Goðafossð er stórt skip. Hann lastar 1457 bingjur. Heldur ikki maskinan er fyri ongum. Maskinorkan er upp á tilsamans 22.000 hestakreftir og gevur skipinum eina ferð upp á 20 míl.

Allur flutningur við Eimskipum er í bingjum. Eimskip ætlar sær størri part farmaflutninginum til og úr Føroyum, sigur Linda Gunnleygsdóttir. Og hon metir, at nýggju møguleikarnir fara at betra væl um útflutningstilboðini úr Føroyum, umframt at innflutningurin sjálvandi eisini verður lagaligari, sigur hon. Fráferð úr Føroyum niður á meginlandið verður leygarmorgun, meðan skipini koma av meginlandinum til Føroya mánamorgun.

Hóast tað frættist uttan úr heimi, at høgu oljuprísirnir hava noytt flutningsfeløg at hækka farmagjaldið, sigur Linda Gunnelygsdóttir, stjóri á Eimskip í Føroyum, at Eimskip fer ikki at hækka farmagjøldini.

Tað er tó ikki bara farmur, sum flytast kann við Goðafoss og Dettifoss. Eisini verður pláss fyri seks ferðafólkum við hvørjum skipinum.

Skipari á Goðafoss er Ingilbert Ingilbertsson, meðan Matthias Matthiasson er skipari á Dettifoss.



# Politikkarar kunnast um n‡ggja Smyril



JÚSTINUS LEIVSSON

EIDESGAARD

Fríggjadagin hittast politikkara at tosa um su›uroyarsiglingina. Hesufer› sn‡r máli› seg ikki um ta ævigu afturvendandi fer›aætlanina ella tørvin á hesi, men um spildurn‡tt skip til su›uroyarsiglingina.

Bjarni Djurholm, n‡ggjur landsst‡risma›ur í samfer›slumálum, hevur bo›i› øllum landsst‡rismonnum og øllum løgtingslimunum vi› á kunnandi fund á Hotel Hafnia í Havn komandi fríggjamorgun. Hetta ger hann saman vi› Vinnumálast‡rinum og Strandfaraskip Landsins.

Strandfaraskip Landsins hava tiki› nøkur av teim innlei›andi stigunum til at byggja n‡tt skip til Su›uroyarsiglingina. Peningur er settur av til projektering og í løtuni ver›a tilbo› innheinta› upp á projekteringina.

Bjarni Djurholm, landsst‡risma›ur sigur, at endamáli› vi› fundinum er geva innlit í hesa umfatandi verkætlan og møguliga at fáa politikkarar at gera vi›merkingar. Kunningin byggir serliga á eina frágrei›ing, sum Strandfaraskip Landsins hevur gjørt. Seinni í ár, tá projekteringin av skipinum fyriliggur og ætlanin er meira ítøkilig ver›ur n‡ggjur kunnandi fundur.

N‡tt skip er ikki bygt til Su›uroyarsiglingina sí›an einafer› í sekstiárunum.

# Ull er Føroya gull

*Frams‡ningin, sum 68 ára gamla Ása Hátún hev›i í Sveis herfyri, eydna›ist sera væl, og áhugin millum fólk og fjølmi›lar var ikki heilt sørur*

STEFAN Í SKORINI

Ása s‡ndi fram hugtakandi listaverk, sum hon hevur virka› úr ull. Hon sigur seg hava fingi› íblástur til listaverk síni frá føroysku náttúruni. Serliga frá barndómsárunum í Bø vesturi í Vágunum.

Ta› skiftandi ve›ri› og tann stórsligna náttúran hava givi› henni íblástur. Eisini er ullin, sum hon n‡tir, ha›ani.

Ása hevur heilt frá barnsbeini av veri› von vi› at arbei›a vi› ullini. Abbi hennara plagdi at spinna hvønn dag, og mó›irin virka›i ullina. Eisini kom ta› fyri, at hon lita›i ullina.

### Ullin fór til spillis

Eftir kríggi› hava vit ikki n‡tt ullina í sama mun sum fyrr, og ta› heldur Ása ver›a spell. Hon leg›i til merkis í sínum arbei›i, at tey ungu líti› og einki kendu til ull. Harvi› fór ein t‡›andi partur av okkara mentan fyri skeyti. og tí fór hon undir at arbei›a vi› ull.

Hetta hevur hon brúkt nógv á Læraraskúlanum, har hon hevur arbeitt, og hon hevur sjálv arbeitt vi› ull sí›ani. Hon kom fram til, at ull er sera væl egna› at arbei›a vi› og hevur hildi› áfram sí›ani.

Á frams‡ningini vóru listaverk, sum Ása hevur gjørt tey seinastu 10-15 árini.

Ása hevur eisini fer›ast nógv vi› síni list, og hon gjørdist limur í nor›urlendska listafelagnum í 1994. Hon hevur havt frams‡ningar Lillehammer í Noregi, í Stockholm í Svøríki, í Danmark, í Íslandi og í mars í fjør hev›i hon sína egnu frams‡ning í Tórshavn.

### Væl móttikin

Verk hennara hava veri› sera væl móttikin, og frams‡ningin, sum var í døgunum 17. - 25. august, hevur veri› væl vitja›. Bæ›i vanligir ásko›arar og fjølmi›larnir hava veri› og kanna› frams‡ningina.

Tá frams‡ningin var› sett, spældi sveisarin Monika Stauss-Joensen, sum er gift til Leirvíkar, á violin. Willi Gohl og Ólavur Hátún fluttu eisini fram rø›u.

Eitt av kvøldunum var møguleiki at smakka føroyskan mat og hoyra føroyskan tónleik. Eisini vísti Ása á hvønn hátt, hon virkar ullina.

Fleiri greinar um frams‡ningina og Føroyar hava sta›i› í sveisiskum blø›um.

## Brutu inn eftir heilivági

*Ótangar hava um vikuskifti› veri › umbor› á Fram 2, sum liggur vi› bryggju í Klaksvík*

Løgreglan í Klaksvík fekk sunnudagin bo› um, at onkur hev›i veri › umbor› á Fram 2, sum liggur vi› bryggju.

Ótangarnir høvdu broti› sær veg inn á brúnna vi› at bróta ein rút og rammuna rundan um. Komnir innar høvdu teir broti› sær veg inn í skiparakamari, har teir høvdu endavent heilivágsskríninum.

Máli› á túrinum var sterkur heilivágur, men ótangarnir fóru av skipinum aftur, sum av torvhei›um, tí manningin hev›i tiki› tann sterka heilivágin vi› sær í land.

Vakthavandi á stø›ini í Klaksvík sigur, at Fram 2 ikki er í drift, og ta› er orsøkin til, at manningin hevur tiki› sterka heilivágin vi› sær í land

ST

## Nevan frammaná

Leygarkvøldi› var› løgreglan bo›send at koma til eitt slagsmál. Ein ma›ur var› sligin beint omanfyri anna› eyga›, og tann tilbur›in vildi hann melda.

Løgreglan kom á sta›i› og skriva›i frágrei›ing um tilbur›in. Frágrei›ingin ver›ur send ví›ari í rættarskipanini, og har ver›ur so avgjørt, um meiri skal gerast vi› máli›, sigur vakthavandi á stø›ini í Klaksvík.

Ta› er ikki óvanligt, at ákæra ver›ur reist í slíkum málum, og tey enda sum oftast vi› hefti.

ST

## Innbrot hjá Brandal

Leygarkvøldi› hevur onkur broti› inn í handilshúsi› hjá Brandal í Klaksvík.

Innbrotstjóvurin hevur broti› sær veg inn gjøgnum eina brandhur›, sum er á eystursí›uni á handilsbygninginum.

Rúturin í hur›ini var› brotin og hagani hevur tjóvurin havt so at siga fría atgongd til allar handlarnar.

Hann hevur vitja inni í f‡ra handlum, og máli› hevur veri› eittans. Hann er farin eftir peningi, og sum løgreglan í Klaksvík hevur fingi› at vita, so er hann farin vi› knøppum 7 túsund krónum, sigur vakthavandi á stø›ini í Klaksvík.

ST

Back-up(4)

Til trygdaravrit verða í dag vanliga brúkt 4 mm. bond. Mest framkomnu bandstøðirnar av hesum slagnum brúka lasarastýring av skrivihøvdinum at kunna skriva heilt út á kantin á bandinum. Eitt VXA-band er 8 mm breitt, men skrivað verður bara á 6 mm 1 mm fríborð er í hvørjari síðu.

Sp/f GEYMAR
Tel. 22 17 87 • geymar@post.olivant.fo
Hygg eisini á www.ecrix.com
*Hans Eliesar, Herbein og Snorri Fjallsbak eiga Geymar*

Sosialurin - 311820